Kyndil-Søljan 15-21(9-8)

Góður enda-spurtur av Søljuni

Talan var um eina reina botnuppgerð, tá ið kvinnuliðini hjá Kyndil og Søljuni hittust í høllini á Hálsi sunnudagin

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað var ein løgin dystur millum kvinnuliðini hjá Kyndil og Stjørnuni. Leikliga skifti gongdin í dystinum fleiri ferðir, og hóast Kyndil leingi sá út til at enda omaná, so vóru tað til endans vágakvinnur, ið vunnu ein tryggan sigur.

Skiftust um at hava leiðsluna

Byrjanin upp á dystin var rættuliga jøvn, og tað gekk nakað strilt við at fáa bóltin í mál. Heimaliðið hevði munin fyrstu løtuna, og tá ið komið var til okkurt um miðjan fyrra hálvleik, var Kyndil á odda 4-2, so talan var ikki um nakað málgildi. Men so gjørdi Søljan bart næstu tíggju minuttirnar og við Heidi Mariu Akselsen á odda skutu tær ikki færri enn fimm mál, meðan heimaliðið als ikki fekk bóltin fram við Kristinu í málinum hjá Søljuni. Tískil vóru tað gestirnir, ið vóru á odda 7-4, tá ið átta minuttir vóru eftir at leika av fyrra hálvleiki. Kyndlavenjarin, Allan Bait, tók nú eitt time-out, og tað virti seg at venda gongdini hjá heimaliðnum, og seinastu átta minuttirnar fekk Kyndil fimm mál, meðan Søljan bert fekk tað eina málið. Hetta førdi við sær, at tá ið farið var til hálvleiks, var tað heimaliðið, ið var á odda 9-8.

Kyndil helt tørn eina løtu

Í byrjanini av seinna hálvleiki gekk leikur javnt á. Kyndil hevði munin fyrstu løtuna, men eftir at Sabine Frølund hevði lagt heimaliðið á odda 12-11 um miðjan seinna hálvleik, steðgaði alt upp hjá Kyndil, og samstundis fekk Søljan av álvara glið á spælið hjá sær. Serliga vóru tað tær báðar Nicoleta Radu og Heidi Maria Akselsen, ið góvu kyndilsverjunni stórar trupulleikar. Seinastu 17 minuttirnar av dystinum fekk Søljan heili tíggju mál, meðan Kyndil einans fekk trý, og tað førdi so við sær, at tá ið teir 60 minuttirnir vóru farnir, var tað Søljan, ið hevði vunnið ein tryggan sigur, 21-15, og harvið liggur Kyndil einsamalt í botninum í 1. deild hjá kvinnum í hondbólti.

Dysturin í tølum

Kyndil-Søljan 15-21 (9-8)
Kyndil: Randi Wardum 6, Anja Heinadóttir 4, Sabine Frølund 2, Annika Thomsen 2, Ann Mari Wang 1
Søljan: Heidi Maria Akselsen 8(1), Nicoleta Radu 7(1), Arnleyg Haraldsen 2, Irdi Mikkelsen 1(1), Fia Selma Nielsen 1, Hertha Simonsen 1, Heidi Haraldsen 1
Brotskøst: Kyndil 2(2), Søljan 6(3)
Útvísingar: Kyndil 3, Søljan 2
Dómarar: Jákup Símun Simonsen og Høgni M. Joensen

Kyndil sýndi eitt sannførandi avrik, tá teir hildu fast um plássið í oddastríðnum

Kyndil-KÍF 36-30 (14-13):

Sannførandi avrik av Kyndil

Viðhaldsfólkini hjá Kyndil fingu sunnudagin tað, ið tey leingi hava longst eftir, nevnliga ein sigur til mansliðið, har tað samstundis eydnaðist teimum grønu at fáa glið á álopsspælið hjá sær

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Kyndil skuldi sunnudagin reisa seg eftir ósigurin fyri hoyvíkingum undanfarna vikuskifti. Kollfirðingar vóru komnir til Havnar á vitjan, og síðst hesi bæði liðini hittust, gjørdist talan um málríkasta dystin í hesum kappingarárinum, tá ið kyndilsmenn vunnu 42-40. Dysturin sunnudagin gjørdist eisini málríkur, um ikki eins málríkur sum seinast.

Kyndil byrjaði betur

Tað sást á øllum brøgdum, at kyndilsmenn vóru rættuliga uppsettir upp á at vinna dystin móti kollfirðingum. Menn vóru tendraðir frá fyrsta bríkslu, og heimaliðið fekk eisini bestu byrjanina. Longu tá ið 10 minuttir vóru leiktir, hevði Kyndil lagt seg á odda við trimum málum, men stutt eftir kom stígur í hjá teimum grønu, og samstundis fekk KÍF betur skil á sítt spæl. Hetta gjørdi, at hóast Kyndil var á odda við trimum málum 9-6, tá ið tíggju minuttir vóru eftir at leika av fyrra hálvleiki, so gingu tað einans fýra minuttir, so høvdu kollfirðingar lagt seg á odda 10-9 við fýra málum á rað. Heimaliðið fekk tó svarað aftur, soleiðis at tá ið farið var til hálvleiks, vóru tað kyndilsmenn, ið vóru á odda við tí eina málinum 14-13.

Nógvir mans um boðið

Í byrjanini av seinna hálvleiki høvdu kollfirðingar stórar trupulleikar av at sleppa fram við verjuni hjá Kyndil, og tá ið tað endiliga eydnaðist stóð Jóhan Danielsen í kyndlamálinum sum ein brandur. Í hinum endanum koyrdi álopsspælið hjá Kyndil væl, og allir mans hildu seg til at skjóta mál. 3

Serliga væl upplagdur tóktist tó Ken Zachariasen á høgra bakki at verða, og hann gjørdist eisini toppskjútt hjá Kyndil við átta málum í dystinum. Tað er tó eisini vert at leggja til merkis, at ikki færri enn sjey av leikarunum hjá Kyndil skutu fýra mál ella fleiri, og tað skuldi borið prógv um eina ávísa breidd á liðnum.

Við stinnu verjuni og flótandi álopsspælinum eydnaðist tað heimaliðnum at leggja sjógv millum seg og KÍF, og tá ið komið var til miðjan seinna hálvleik, hevði Kyndil lagt seg á odda við seks málum, og dysturin var fyri so vítt avgjørdur. KÍF vildi tó ikki geva skarvin yvir, og teir stríddust manniliga. og onkuntíð eydnaðist tað kollfirðingum at minka um munin niður í fýra mál, men nærri enn tað kom KÍF ongantíð.

Lagt er upp til eitt brak av eini lokaluppgerð

Komandi sunnudagin skal Kyndil so av álvara standa sína royndd, tá ið teir skulu leika lokaluppgerð móti grannunum úr Neistanum. Liðini bæði liggja ájavnt í stigum á fremsta plássi í bestu mansdeildini, men Neistin hevur fýra mál betur í málmuninum og liggur tískil ovast á talvuni. Skal Kyndil gera nakað við Neistan, so er neyðugt hjá teimum at spæla upp til sítt allarbesta, tí neistamenn vóru ógvuliga sannførandi í oddabrakinum í Vestmanna sunnudagin, tá ið teir vunnu ein greiðan sigur á vestmenningum. Í fyrra dystinum millum Kyndil og Neistan í endaspælinum vóru tað neistamenn, ið runnu kyndilsmenn um koll og vunnu ein sera tryggan sigur upp á heili tíggju mál. Vinnarin av dystinum komandi sunnudag hevur sjálvsagt bestu kortini á hondini til at gerast meistari undan seinasta leikumfari, har Neistin skal vitja hoyvíkingar, meðan Kyndil fær vitjan av VÍF. Vinnur Kyndil dystin móti Neistanum, samstundis sum VÍF vinnur á StÍF, merkir tað, at vestmenningar kunnu gerast meistarar við at vinna á Kyndli í Havn á seinasta leikdegi 3. apríl.

Dysturin í tølum

Kyndil-KÍF 36-30 (14-13)
Málskjúttar
Kyndil: Ken Zachariasen 8, Josef Abrahamsen 6(1), Hans Áki Dal-Christiansen 6(1), Høgni Klein 4, Janus Einar Sørensen 4, Jónleif Sólsker 4, Jacob Jónsson 4
KÍF: Petur Martin Poulsen 8, Damir Oros 7(1), Mirko Milinkovic 6, Gert Hansen 4, Regin Petersen 4, Rógvi Weihe 1
Brotskøst: Kyndil 3(2), KÍF 1(1)
Útvísingar: Kyndil 3, KÍF 6 (Rógvi Weihe 3x2 minuttir)
Dómarar: Jákup Símun Simonsen og Høgni M. Joensen

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Kunngerð

Kirkjubøar Kommuna hevur á kommunustýrisfundi mikudagin 10. mars 2004 samtykt hesi gøtunøvn á Velbastað og í Kirkjubø:

Á **Velbastað** verða nøvnini hesi:
1. Vegurin frá Økslini omanfyri bygdina og norður á Sandheyggj verður kallaður **Ervavegur**.
2. Vegurin frá Sandheyggi og út á Markið verður kallaður **Norðuri á Heyggi**.
3. Vegurin inn til Bøllubrekku og Símunartrøð, Torfinn og Jóannes íroknað, kemur at eita **Gerðisbreyt**.
4. Vegurin inn til Barnagarðin kemur at eita **undir Borgarhálsi**.
5. Vegurin frá húsinum hjá Linu og Janu og norðeftir kemur at eita **Norðuri á Trøð**.
6. Vegurin frá Markinum og út á Øksl kemur at eita **Úti á Heyggi**.
7. Vegurin oman til Høgna og Óluvu kemur at eita **á Stórheyggi**.
8. Vegurin oman á lendingina á Velbastað kemur at eita **Bakkavegur**.

Í **Kirkjubø** verða nøvnini hesi:
1. **Inni á Fjósi,** vegurin niðan til Tróndd.
2. **í Geilini,** vegurin frá Bjørn og heim ímóti bygdini.
3. **í Lágabø,** vegurin inn til Hjørt.
4. **Ovarivegur,** vegurin frá krossinum, heim á Líkhús og runt um Múrin.
5. **Gamlivegur,** vegurin frá krossinum og oman á Dunga.

Kirkjubøar Kommuna

Leiðari

Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík søkir eftir leiðara, við pedagogútbúgving at byrja 1. juni ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Dáin er ein samdøgurstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.
Umframt døgnumlætting, hevur Dáin eisini eina dagumlætting, har 4 børn/ung koma dagliga, gerandisdagar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 457185.

Umsóknarfreistin er 15.04.04 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m, stílast til:

Stýrið fyri Umlættingarheimið Dáin
Mýrivegur 11
700 Klaksvík

veitst tú ikki tað?

Góðska á hægsta stoði, hevur eitt navn!
Spyr sjálvandi eftir
ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR

Gerið kvettið:
1 Echostar boks og 1 skermur

Við í prísinum eru:
- 10 rásir frá BBC
- 4 andaligar rásir
- 1 barnarás
- 2 filmrásir
- 3 tíðindarásir
- og fleiri aðrar

Fyri einans 2.995,-

Allar eru gjaldsfríar rásir

Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-

Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 421411 ella 215328

Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline

BILUR TIL SØLU

TEL 22 15 14

Ársaðalfundur

Aðalfundurin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag verður í hølum felagsins týsdagin 6. apríl 2004 kl. 20.00.

Skrá:
Formansfrágreiðing
Framløga av góðkendum roknskapi
Nevndarval
Góðkenning av viðtøkum felagsins
Ymiskt

Nevndin

Góðir brúktir bilar

Nissan Almera 2.0 Diesel GX reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 — 72.000
Opel Astra 1.4 grønur, árg 1996, 3 hurðar, km. 116.000, sýnaður 30. jan 2003 — 56.000
Nissan Primera 1.6 Player svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 — 67.000
Opel Astra 1.6 16V gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000 — 112.000
Nissan Patrol 4.2 Diesel reyður, árg 1989, 5 hurðar, km 285.000, krevur ábøtur — 55.000
Opel Astra 1.6 16V hvítur, árg 1996, 4 hurðar, km. 119.000 — 64.000
Peugeot 306 XR 1.4 reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 40.000 — 95.000
Opel Astra 2.0 Di Sedan vinreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 97.000 — 115.000
Peugeot 306 XR 1.4 reyður, árg 1999, 5 hurðar — 89.000
Opel Vectra 2.0 DT Station Car svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000 — 95.000
Peugeot 306 DieselTurbo1.9 gráur, árg 1995, 4 hurðar, km. 205.000 — 46.000
Saab 9-3 2.2 TiD blár, árg 2001, 5 hurðar, km 74.000 — 195.000
Peugeot 406 1.8 grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 — 99.000
Honda Accord 2.0 gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 — 155.000
Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon vinreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 132.000, fyrr 145.000 — nú 135.000
Toyota Avensis 1.8 Sol blár, árg 2001, 4 hurðar, km. 48.000 — 178.000
Peugeot Expert Combi 2.0 Hdi, 110 HK, 8 sitipláss blár, árg. 2003, 4 hurðar, km. 19.000 — 259.000
Citroen Xantia 1.9 TD blár, árg 1997, 5 hurðar. km. 184.000 — 75.000
Peugeot 406 ST 2.0 gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000 — 130.000
Citroen Xantia 2.0 Hdi, Station Car grønur, árg 2000, km. 110.000, sýnaður 19. feb 2004 — 148.000
Peugeot 605 SRDT 2.1 Aut blár, árg 1994, 4 hurðar, verður seldur við brotnum gearkassa — 15.000
Ford Escort 1.8 blár, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 — 59.000
Opel Agila 1.2 grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- — nú 95.000
Hyundai Accent 1.5 AirCon gráur, árg 2000, 5 hurðar, km. 92.000 — 89.000
Opel Corsa 1.4 Swing grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 62.000 — 79.000
Suzuki Baleno 1.3 blár, árg 1997, 4 hurðar km. 74.000, sýnaður sep 2003 — 57.000
Opel Corsa 1.4 Swing grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 — 68.000
Fiat Cinquecento 1.1 gulur, árg 1995, 3 hurðar — 38.000

Sosialurin 34180

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 345400,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 - Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 34180